23 oljufeløg samstarva um umhvørvistøl

– Samstarvið er serligt og tað fyrsta av sínum slag í øllum heiminum, sigur Alex Buvik, sum umboðar Oljufyrisitingina í styrbólkinum fyri verkætlanini

ELI GUTTESEN

Eg var heilt bissin yvir, at oljufeløgini vildu fara inn í hetta samstarvið, aðrenn tey yvirhøvur vita, hvar tey fáa loyvi til at royndarbora, sigur Alex Buvik, sum er trygdarleiðari á oljufyrisitingini og hevur fleiri ára royndir innan oljuidnaðin.

– Tað vanligt er, at oljufeløgini bruka pening til slikar kanningar, tá tey vita hvar tey fáa loyvi til at bora. Men her verða bruktar fleiri millionir til kanningar, aðrenn nakar hevur fingið nakað borloyvi og tað er als ikki vanligt, sigur Alex Buvik.

Neyðugir upplýsingar

Tey 23 oljufeløgini og umboð fyri visindastovnar í Føroyum hava nú gjørt sattmala, við tí endamáli at samstarva um at fáa til vega nog mikið av upplýsingum/talmongdum um føroyska havumhvørvið (livfrøðiliga, alisliga og evnafrøðiliga).

Hetta taltilfar skal vera grundin undir teimum sundurgreiningum um vandar, sum gerast mugu, aðrenn sølkjast kann um borloyvi.

Upplýsingarnir eru millum annað neyðugir, so olju-feløgini kunnu byggja útgerð, sum er nog trygg til føroyskt havoki.

Verkætlanin er liður í fyrreikingunum undan fyrsta loyvisumfarnum, sum væntandi verður rættliga skjótt.

Samstarvið ber heitið GEM-verkætlanin og hevur sum endamál at savna taltilfar og at gera kanningar fyri at kortleggja økið kring Føroyar út frá einum jarðfrøðiligum-, livfrøðiligum- og havfrøðiligum sjónarmiði.

Stór verkætlan

GEM-verkætlanin verður stýrd av einum stýrisbólki, sum hevur til uppgávu at stýra verkætlanini, so hon røkkur sínum endamáli, og at jatta pening til einstøku partsverkætlanirnar.

Formaður í styrbólkinum er Halvor Snarvold. Føroysku umboðini í styrisbólkinum eru Alex Buvik frá Oljufyrisitingini og Hjalti í Jákupsstovu frá Fiskirannsóknarstovuni. Harumframt sita trý umboð fyri oljufeløgini eisini í styrbólkinum.

Undir stýrisbólkinum eru triggir fakbólkar Fyrst er ein jarðfrøðibólkur, sum skal kanna fysisku viðurskiftini á havbotninum. Harnæst er ein livfrøðibólkur, sum skal kanna djóra- og plantulivið í sjónum og á havbotninum kring Føroyar. Triðji bólkurin er ein kombineraður veðurlags- og havfrøðibólkur. Hesin bólkur skal savna upplýsingar um vind-, aldu- og streymviðurskifti í føroyska økinum.

Allir triggir bólkarnir fara at brúka tað taltilfar og tær kanningar, sum eru til taks, men fara harumframt at seta nýtt kanningararbeiði í gongd. Úrslitið av hesum staðbundnu kanningunum skal so vera við til at hækka vitanarstoðið hjá oljufeløgunum. Aðalmálið hjá oljufeløgunum við verkætlanini er at fáa vitan til vega, so neyðugar umhvørvis- og trygdarmetingar kunnu gerast, aðrenn farið verður undir borvirksemi.

Henda umfatandi verkætlanin undir-strikar í stóran mun tann tydning, oljufeløgini leggja í, at umhvørvisspurningurin verður loystur so tíðliga sum møguligt.

Roknað verður við, at verkætlanin kemur upp í nakrar tiggjutals millionir og fer at vara, so leingi oljuvirksemi er við Føroyar. Men uppgávurnar broytast helst nakað við tíðini.

Fysiska ramman um GEM-verkætlanina verður føroyska fyritøkan Atlanticon, sum landsstyrið og føroysku vinnufeløgini eiga í felag. Fyritøkan skal standa fyri teimum einstøku kanningarverkætlanunum og umsita upplýsingarnir fyri oljufeløgini.

Runavíkar telefonstøð digitalstýrast

Gongur eftir ætlan, verður telefonstøðin í Runavík digitalstýrd frá 19. mars. Tá er arbeiðið at digitalisera allar felagar undir øki 4 liðugt

JOANNES S. HANSEN

Øki 4 telur í dag 4423 felagar, harav Runavíkar støð hevur 2108 felagar.

TLF og L. M. Ericsson

– Tá ein útbygging sum henda tøkniliga liggur á einum sera høgum støði, sigur tað seg sjálvt, at umleggingin hevur kravt nógv av fólkinum hjá telefonverkinum her í oynni, sum hava gjørt arbeiðið saman við fólki frá L. M. Ericsson, sigur Sofus Nielsen, økisleiðari.

Hann legur eisini dent á, at alt arbeiðið í sambandi við umleggingina er gjørt samstundis sum alt tað dagliga arbeiðið.

Eitt slag av home-telefoni

Tá arbeiðið er liðugt, fara allir felagar undir 47-, 48- og 49000 at merkja eina broyting til tað betra, sigur Sofus Nielsen.

– Meiri kann gerast av felaganum heima, ja eitt slag av home-telefoni.

Telefonin verður kvikari og meiri brukaravinarlig.

Fleiri eykatænastur

Eisini hevur nyggja skipanin við sær, at felagarnir fáa fleiri eykatænastur, bæði privatir og vinnuligir felagar.

Sum dømi nevnir Sofus Nielsen, at ringar ein felagi, og móttakarin er bundin, so er bara at trýsta 5. Tá so móttakarin er liðugur at tosa, ringir telefonin hjá felaganum sjálvvirkandi uppaftur, og samband er millum felagarnar. Ein tænasta sum henda styttir nógv um biðtíðina.

Ein onnur tænasta, sum verður møguligt frá 19. mars, er, at ynskir felagi veking, so kann hettar eisini avgreiðast heima.

Nógvar aðrar tænastur eru í sambandi við umleggingina, sum eisini hevur við sær eina tænastu í sambandi við viðarikopling, sum serliga kann koma smærri vinnufyritøkum væl við.

Meiri pláss á støðini

Eitt annað sum umleggingin eisini hevur við sær er, at meiri pláss verður á sjálvari telefonstøðini, ti útgerðin, sum nú verður uppsett, krevur bert 1/20 av tí plássi, sum áður var neyðugt.

Upp á fyrispurning nær GSM skipanin verður tøk í Eysturoynni, sigur Sofus Nielsen, at gongur eftir ætlan, skuldi henda skipan koyrt í Eysturoynni um gott og væl eitt ár.

Við frá byrjan

Ingvard Olsen á Glyvrum, sum vit eisini hittu, er fegin um hesa útbyggingina, ið er ein av mongum, sum Ingvard hevur verið við til.

Ingvard hevur starvast hjá Telefonverkinum í 48 ár. Sjálvur var hann við til at byrja automatiseringina í 1958. Tá voru einans 300 felagar knýttir at støðini í Runavík.

Upp á fyrispurning um broytingar sigur Ingvard, at tað hevur verið stór broyting til tað betra, at allar linjur í dag liggja niðurgrivnar, so veður og vindur onga ávirkan hava á telefonnetið.

Í dag starvast átta folk hjá Telefonverkinum í Eysturoynni, iroknað Telebuðin, sum heldur til í bygninginum hjá Telefonverkinum í Søldarfirði, og sum hevur avgreiðslu yrkadagar millum kl. 10 og 16.

Sofus Nielsen og Ingvard Olsen hava báðir verið við í uthyggingini í sambandi við digitaliseringina av øki 4, og teir eru væl nøgdir við úrslitið

Mynd: Joannes R. Hansen



Í Dreymur Jóansøkunátt« eru 12 leikarar, ið lutað hava 20 leiklutir sínámillum. Her eru tað tey bæði Ria Tórgarð og Páll Danielsen, ið eru á pallinum í Norðurlandahúsinum eina løtu.

Mynd: Kelmar Lindenskov

Dagur Shakespeare

Tað er í kvøld, at 50 leikur hjá 20 ára gamla sjónleikarabólkinum Grímu verður framfurdur.

Sostatt er hetta ein rættur veitsludagur fyri bólkin, sum hevur fingið Norðurlandahúsið bæði at venja og spæla stóra leikin hjá William Shakespeare »Dreymur Jóansøkunátt«.

Axel Tórgarð hevur umsett úr enskum til føroyskt.

Í leikinum, sum varir út við triggjar tímar, eru 12 leikarar, ið tilsamans hava um 20 leiklutir. Eyðun Johannesen, leikstjóri, hevur sett leikin, sum framfurdur verður í einar tvær vikur, upp og leikstjórnað.

Eftir framførslunna í kvøld verður móttøka við ábiti.

Fiskaarbeiði kann aftur gerast veruleiki á »Polarfrost«

Uppskot er lagt fyri tingið, har landsstýrinum verður heimilað at keypa fyrrverandi Polarfrost í Vági, soleiðis at virksemi aftur kann fáast á flakavirkinum

SNORRI BREND

Friggjadagurin 30. september 1994 var ein sermerkur dagur í Vágs bygd.

Henda dagin fóru fólk sum vanligt til arbeiðis á flakavirkinum í Vági, kanska við vitanini um, at hetta var seinasti arbeiðsdagur teirra á Polarfrost í eina tíð.

Hóast 3 1/2 ár eru farið síðani henda dag, hevur einki vinnuligt virksemi verið á hesum flakavirkinum síðuni tá.

Men nú ætlar tingmaðurin Henrik Old at gera nakað við hetta malið, og hevur tí skotið upp, at landsstýrið fær heimild at keypa hetta virkið.

Tá hetta er framt, kann landsstýrið so selja virkið viðari til hægstbjóðandi, sum vil átaka sær at fáa virksemið í gongd aftur á flakavirkinum.

Vónir kveiktar

Henrik Old sigur, at veruleikin er tann, at hvørki Fiskavirking ella Framtaksgrunnurin hava viljað havt virkið í gongd aftur.

– Tær treytir, sum aðrir áhugaðir hava fingið, hava verið so út av lagi harðar, at eingin møguleiki hevur verið at kunna byrja aftur, sigur hann.

Tá seinasta umleggingin av eigaraviðurskiftunum í Fiskavirking fór fram fyri góðum ári síðani, kveikti hetta vónir í Vág, tí hetta felag tá varð býtt sundur.

Eftir hetta vórðu áttu virkir eftir í Fiskavirking, ið øll skuldu í gongd, meðan restin varð yvirtikin av einum felag hjá Føroya Banka.

Tingmaðurin sigur, at tíbetur eru flestu virkini, sum vórðu loyst frá Fiskavirking, so liðandi komin í gongd aftur.

Flakavirkið í Vági hevur verið afturlatið síðani á heysti 1994. Nú verður ein royndgjørd at fáa virksemi aftur her

Stórt arbeiðsloysi

Av hesum átta virkjunum, sum Fiskavirking hevði eftir, var flakavirkið í Vági eitt.

– Men heldur ikki hesa ferð er nøkur von fyri virkseminum á flakavirkinum í Vági.

– Tí er greitt, at Fiskavirking fekk virkið í Vági í sín bólk við bert tí eina endamálinum: Einki virksemi skal vera í Vági, vísir Henrik Old á.

Fyri sunnaru helvt av Suðuroynni hevur hetta havt katastrofilar fylgjur, soleiðis at hetta økið enn hevur størsta arbeiðsloysið í landinum.

Landsstyrið er helst einasti instansur, sum kann trýsta Framtaksgrunnin og Fiskavirking at selja virkið treytaleyst, soleiðis at hetta trupla mál kann verða loyst.

Henrik Old sigur, at hann ikki kann staðfesta tær figgarligu avleiðingarnar, fyrr enn uppskot um keypsavtalu fyriliggur.

Bahá'í samfelagið fagnar kvinnudegnum

Tað er sagan um, hvussu vanligu kvinnurnar skaptu sagu, ið verður prísað altjóða kvinnudagin.

Síðan dagurin á fyrsta sinni varð hildin í 1911, hevur dagurin um allan heim verið eitt høvi hjá kvinnum at savnast at fegnast um gongdina á fraðisleiðið og til at syna teir sigrar, sum tær enn mugu vinna.

Bahá'í-trúgvandi kvinnurnar hátíðarhalda altjóða kvinnudagin við at kunna fleiri um ST-stevnuna, sum miðjar ímoti at beinast skal fyri øllum mismuni, sum kvinnum er fyri - kvinnustevnan. Kvinnustevnan er eitt altjóða logaruppskot til kvinnurættindi. Henda stevna savnar og viðkar tiltøk, sum ST-stovnurin áður hevur sett í verk í sambandi við mismun, sum er grundaður á kyn. Annað er, at hon stimbrar tey viðurkendu mannarettindini, tí hon somuleiðis lýsir mismun, ið er kvinnum fyri, sigur Kvinnuframburðarleiðin hjá Bahá'í samfelagnum.

– Uttan so at kvinnum av sonnuni verða veitt javnrættindi, fáa hvørki tær ella menn fult og heilt ment tað, ið tey eru før fyri, og varandi friður og almannarættindi kunnu ikki staðfestast, verður sagt.

Tey, ið trúgva á Bahá'í, eru fullvis í, at kvinnufraðsið er grundstøðið undir framburði menniskjans. Um vit fara at megna at grunda og fremja siðalagsløru og logligu umstøðurnar, sum eggja til og veita rættvísi í samfelagnum, fer lítmaskupur kvinnunnar at verða ójavnur við lítmaskapin hjá monnum.